Framvegis ikki til mentan og ítrótt:

# Oljupengar skulu førleikamenna vinnuna

**Ongar ætlanir eru í løtuni at víðka grundarlagið fyri veiting av stuðuli frá oljufeløgunum til førleikamenning. Pengarnir, sum oljufeløgini bundu seg til at lata, tá tey fingu leitiloyvi, skulu framhaldandi brúkast til at førleikamenna vinnuna og í hesum sambandi eisini til gransking og útbúgving kom fram á Oljutinginum mikukvøldið. Oljumálaráðið setir karmarnar, meðan oljufeløgini suverent gera av, hvørjar verkætlanir skulu stuðlast**

OLJUPENGAR OG FØRLEIKAMENNING
*Jan Müller*

Tey flestu fólkini, ið høvdu leitað sær í Oljutingið mikukvøldið mundu hava áhuga í at vita, hvussu mannagongdin er, tá oljufeløgini lata pengar til førleikamenning, og hvat hesir pengar verða latnir til. Petur Joensen, deildar-leiðari í Oljumálaráðnum helt ein áhugaverdan fyrilestur, men hann var eisini "bombarderaður" aftaná við spurningum.

Heitið á fyrilestrinum var "Hvørjar treytir eru fyri brúk av oljupengum til førleikamenning og føroyska luttøku og hvør skal førleikamennast"?

Oljufeløgini, sum fingu seks ára leitiloyvi í 2000, bundu seg sum part av føroysku luttøkuni til at lata umleið 86 mill. kr. yvir eitt seks ára skeið til førleikamenning av føroyskum vinnulívi. Petur Joensen vísti á, at ein høvuðs-orsøkin til at oljufeløgini skulu lata pengar til førleikamenning av føroyskari vinnu er ynski og kravið frá myndugleikunum um, at føroyingar skulu luttaka í oljuvinnuni og var og er ein fortreytin fyri tí førleikamenning av vinnu og fólki. Hetta var so eisini nakað, sum oljufeløgini góðtóku.




Førleikamenningin, sum er grundað á føroyska luttøku í hesi vinnu, er trílíðað soleiðis, at oljufeløgini átaka sær at gera samstarvsavtalur millum føroyskar og útlendskar fyritøkur, at skipa so fyri, at føroyskar fyritøkur skulu hava veruligar møguleikar at bjóða uppá arbeiði og harvið sleppa uppí part og í triðja føri at skipa fyri førleikamenning. Endamálið við førleikamenningini er eisini at stuðla tí yvirskipaða endamálinum, nevniliga at víðka virkisøkið við vinningi fyri eyga tvs. fáa vinnur í gongd og tjena pengar og síðani at hækka vinnuliga førleikan beinleiðis og gjøgnum útbúgving og gransking.

Tað er sostatt ikki bara er ein spurningur um pengar. Tað áliggur oljufeløgunum at skipa fyri, at førleikin verður gjøgnumførdur.

Førleikamenningin skal geva okkum at eitt fundament at byggja á, soleiðis at føroyingar vera førir fyri at luttaka í olju- og gassídnaðinum. Tað vil so vera, at tað er ikki altíð lætt at avgera, hvat førleikamenning er. Petur Joensen vísti í hesum sambandi á, at førleikamenningin skal merkjast í fyritøkuni og skal helst verða nýskapandi. Tað hevur víst seg at vera trupult at definera olju- og gassídnað. Tað er jú eisini tørvur á royndum undirlevarandørum.

Ávísar treytir verða settar til tey feløg og stovnar, sum søkja um pengar til førleikamenning. Hesi pengar kunnu m.a. fara til skeið, ferðing og uppihald, løn til fólk í granskingarútbúgving, keyp av undirvísing, innanhýsis útreiðslur hjá loyvishavum og í serstøkum førum til útgerð. Tey, sum kunnu fáa av hesum pengum, eru fyritøkur, útbúgvingarstovnar, myndugleikar og í undantaksføri einstaklingar. Ein greið ætlan skal fyriliggja og skal eginpeningurin helst vera um tey 10%. Petur Joensen nevndi, at í orðaskiftinum hevur verið funnist at, at pengar til førleikamenning eru farnir av landinum. Tað helt hann ikki vera nakran trupulleika, tí vit hava jú eisini brúk fyri at fáa vitan og royndir uttanfyri landoddarnar.

Gjørt varð púra greitt, at tað er ikki Oljumálaráðið, sum umsitur førleika-pengarnar. Tað eru oljufeløgini tvs. loyvissamtøkini, sum umsita sín stuðul og gjalda hann út. Og tí skulu umsóknir sendast beinleiðis til teirra. Eisini kunnu tey sjálvi taka stig til verkætlanir. Oljumálaráðið arbeiðir í løtuni við at gera eina vegleiðing um øll hesi viðurskiftini og fer hon at verða løgd út á netið á www.omr.fo.

Leikluturin hjá Oljumálaráðnum er at leggja karmarnar og árliga at fylgja upp verkætlanunum tvs. vita, hvussu gingist hevur.

Petur Joensen segði seg vóna, at pengar latnir til førleikamenning sum heild geva eins góð úrslit og tey, sum Hans Pauli Joensen frá Náttúruvísindadeildini kundi vísa í fyrilestri sínum (Síða 25). Tað er upp til loyvishavararnar og móttakararnar av pengunum at avgera, hvussu úrslitið av førleikamenningini verður. Hann gjørdi eisini púra greitt, at ongar stórvegis broytingar eru ella verða gjørdar sjálvum karminum í sambandi við førleikamenningina. Tað hevur verið frammi at lata pengar til mentan og ítrótt, men tað kemur ikki uppá tal uttan so at sjálvir karmarnir fyri førleikamenningini verða broyttir. Og tað kann bara landsstýrismaðurin saman við oljufeløgunum gera. Tí er tað meira ein politiskur spurningur, um oljupengarnir skulu fara til onnur øki í samfelagnum. Petur Joensen helt ikki, at tað vórðu ætlanir um broyta nakað annað enn at gera grundarlagið eitt sindur breiðari.

Uppá fyrispurning hvør hevur eftirlit við, at pengarnir nú verða brúktir rætt og um møguleiki er at kæra mál í hesum sambandi segði Petur Joensen, at tað finst eingin kærumyndugleiki. Oljufeløgini eiga pengarnar og tey gera av - út frá verandi karmum sjálvandi - hvør fær ja og hvør nei. Eru tey í iva um okkurt, so spyrja tey Oljumálaráðið. - Vit hava sett karmarnar, sum siga, at peningurin skal brúkast til vinnuliga førleikamenning. Oljumálaráðið nýtist ikki at síggja tær verkætlanir, sum verða góðtiknar.

Pengar, sum ikki verða brúktir av samlaðu 85 mill. kr. eftir at seks ára loyvið er útrunnið, fara í ein grunn, sum skal brúkast til føroysk endamál. Enn eru reglur ikki gjørdar fyri henda grunnin.



*Stórur áhugi var fyri at hoyra, hvørjar treytir eru fyri brúk av oljupengum*

*Mynd Jan Mülle*



# Gransking fyri oljupengar gagnar øllum samfelagnum

**Ein partur av pengunum, sum oljufeløgini lata til førleikamenning í Føroyum, fer til granskingarverkætlanir hjá Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum. Úrlitini av hesi gransking koma ikki bara frálandavinnuna til góða. Tey gagna bæði alivinnu, útróðrarvinnuni, skipaferðsluni og KT-vinnuni. Hetta varð ein av áhugaverdu niðurstøðunum á Oljutinginum, sum varð hildið í Havn mikukvøldið**

GRANSKING OG OLJUPENGAR
*Jan Müller*

Hans Pauli Joensen, leiðari á Náttúruvísindadeildini greiddi frá náttúruvísindaligu granskingini við atliti at oljuvinnu og hvussu aðrar vinnur kunnu fáa gagn av hesi gransking. Seinastu árini hevur Náttúruvísindadeildin verið rættiliga virkin á granskingarøkinum. Ein orsøk til hetta eru pengar, sum oljufeløg hava latið til verkætlanir í Føroyum. Ein stórur partur av hesum verkætlanum hevur verið og er á Náttúruvísindadeildini. Hans Pauli Joensen greiddi mikukvøldið teimum umleið 100 luttakaranum í Oljutinginum frá hesum arbeiði. Granskingarevni við atliti at oljuvinnu arbeitt verður við eru bergmekanikkur, seismikkur, streymur og alda á Føroyaleiðini, reservoirmodel og ymisk evni við atliti at umhvørvi. Roynt verður við hesum at menna granskingina og granskingarførleikan ígjøgnum PhD-verkætlanir.

Gransking hevur sum so stóran týdning fyri ta oljuleiting, sum fer fram við Føroyar. Við at fáa til vega vitan um mekaniskar eginleikar hjá basalti ber til at menna boriðarbeiðið og tú fær betri møguleikar fyri at tulka, hvat goymir seg undir basaltinum. Sum eitt úrslit av arbeiðinum hevur man útviklað amboð til at lýsa spenningar í undirgrundini. Nevnast kann eisini, at úrslit av granskingini verða nú nýtt í norskum telduforritum, sum spáa um boriholsrivur í boringum í Norðsjónum. Eisini eru nýggj lyklatøl funnin, sum viðvíkja grótstyrki í undirgrundini. Onnur ítøkilig úrslit er ein PhD-verkætlan, sum skal verjast á vári 2003.

Granskingin fevnir so eisini um at menna vísindaliga førleikan til at fata og tulka seismiskar mátingar í m.a. føroyska økinum. Hetta er eisini nakað, sum hevur stóran týdning fyri leitingina á landgrunninum. Trupulleikin hjá oljufeløgunum í dag at kunna síggja niður undir basaltið. Føroyska granskingin fevnir tí eisini um at kanna orsøkir til trupulleikar við at fáa kunnleika um sediment undir basaltinum. Sindri boriverkætlanin á Glyvursnesi í løtuni arbeiðir eisini við at loysa upp fyri hesum trupulleikum.

Náttúruvísindadeildin arbeiðir eisini við øðrum áhugaverdum verkætl-anum, sum aðrar vinnur og stovnar í føroyska samfelagnum kunnu hava stóra nyttu av. Eitt nú við at gera modell fyri bæði sjóvarfallsstreym og aldu kring oyggjarnar og úti á havinum, har oljuleiting fer fram og har møguliga framleiðsla verður í framtíðini. Hesi arbeiði eru komin væl áleiðis. Gjørt er eitt streymmodell og gerð av teldutøkum aldumodelli byrjar í desember í ár. Har verður m.a. kannað, hvussu botnviðurskifti og streymur ávirka aldurnar. Hesi modellini hava atlit at bæði frálandavinnu, alivinnu, útróðrarvinnu og skipaferðslu. Hans Pauli Joensen kundi fortelja Oljutinginum, at úrslitini av teirra gransking kunnu ganga nógvum øðrum tættum í samfelagnum enn bert teimum, sum hava atlit til oljuvinnu. Tvs. at pengar frá oljufeløgunum til granskingarætlanir hava nógvar ringvirkningar fyri samfelagið sum heild.

Í sambandi við frálandavinnuna kunnu eitt nú streymmodellini siga okkum, hvussu ein oljublettur frá eini dálkingarvanlukku ella frá eini boring ferðast. Sama streymmodell kann hjálpa alivinnuni til at finna nýggja hóskandi aliøki, tað kann siga nakað um spjaðing av dálking, og tað kann eisini siga nakað um, hvussu t.d. sjúka eitt nú ILA kann ferðast frá einum parti av landinum til ein annan. Spjaðing av fiskasjúkum kann byggjast inn í verandi modell og hava stóran týdning fyri alivinnuna og samfelagsbúskapin. Nógv av hesum er tó sera teldukrevjandi og tað er enn avmarkað, hvat Náttúruvísindadeildin kann gera vegna manglandi teldu-orku. Síðani kann streymmodellið eisini kunna geva útróðrarmonnum neyvar upplýsingar um fiskimið, ýti, botnviðruskifti, sjóvarfall ol. Fyri skipaferðsluna og eitt nú bjargingartænastuna kann tað eisini hava týdning sum streym- og aldukunning. Sum eitt lítið koriosum í sambandi við hvussu neyv streymmodell kunnu gerast nevndi Hans Pauli Joensen, at ein dálking á Glyvursnesi vil enda á Lívfiskastøðini í Skopun. So granskingin kann fáa stóran týdning fyri nógv lið í samfelagnum.

Í sambandi við havmodellini, sum verða gjørd, er tað Knud Simonsen, lektari á Náttúruvís-indadeildini, sum stendur fyri granskingini. Her ber til at kunna seg meira á heimasíðuni, sum hann hevur gjørt um havfrøði á stovninum: http:sleipnir.fo/setur/nvd/havfrodi/.

Niðurstøðan hjá Hans Paula Joensen er tann, at gransking, sum Náttúruvísindadeildin á Fróðskaparsetrinum stendur fyri, er við til at menna granskingarumhvørvið í landinum, við til at útbúgva oljuverkfrøðingar og er við til at tilføra førleika á høgum stigi t.d. professarar. Úrslitini av granskingini og teimum ymsu verkætlanunum koma so eisini mongum liðum í samfelagnum til góða umframt oljuleitingini við Føroyar og frálandavinnuni. Tey gagna øðrum vinnum so sum alivinnuni, útróðrarvinnuna , skipaferðsluni og KT-vinnuni.

Feløgini, sum hava verið við til at fíggja virksemi á Náttúruvísindadeildini eru Statoil, Mobil, Enterprise Oil, Phillips og Veba umframt at pengar eru komnar á fíggjarlógina til virksemi hjá Setrinum.

Sera áhugaverdi fyrilesturin hjá Hans Paula Joensen má sigast at standa eitt sindur í andsøgn til sjónarmiðini hjá Vinnuhúsinum, sum verða løgd fram í bóklinginum "Vinnusjónarmið 2002" , partur 5.3 á s. 31, har tikið verður til, at Fróðskaparsetrið ikki dugir at stýra verkætlanum. Gjølliga, sakliga og upplýsandi viðgerðin hjá Hans Paula Joensen av granskingini og granskingarúrslitunum hjá Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum prógvaði, at tey duga væl. Tí má tað sigast at vera harmiligt, at ein ikki ov væleydnað verkætlan skal káma út yvir alt annað virksemi og brúkast til at generalisera førleikan hjá hesum stovninum til at medvirka í verkætlanum við vinnuligum atliti. Gott er við orðaskifti og atfinningum, men tað man tæna bæði vinnuni, Vinnuhúsinum og stovnum sum Náttúruvísindadeildini best, at hesi samstarva við opnum sinni og gagna hvørjum øðrum. Øll eru tey partur í eini felags søk.



*Hans Pauli Joensen, leiðari á Náttúruvísindadeildini og Petur Joensen, leiðari av búskapar- og vinnudeildini í Oljumálaráðnum hildu áhugaverdar fyrilestrar fyri einum fullsettum Oljutingi mikukvøldið. Her saman við forkvinnuni í Oljutinginum, Anni á Hædd*

*Mynd Jan Müller*



*Nógv fólk hevði leitað sær í snotuligu fyrilestrarhølini á Sjómansskúlanum mikukvøldið at hoyra, hvussu pengar frá oljuvinnuni verða brúktir í gransking og vinnulívi*

*Mynd Jan Müller*